**UTTAN ÚR HEIMI**

## Kjarnorkuverk illa tryggjað

Ein fyrrverandi embætismaður í amerikanska orkumálaráðnum vil vera við, at tey amerikonsku kjarnorkuverkini eru sera illa tryggjað.

Rich Levenier, sum arbeiddi í orkumálaráðnum í Washington frá 1995 til 2001, sigur við blaðið Vanity Fair, at myndugleikarnir kannaðu kjarnorkuverkini eina ferð um árið, og hendan kanning umfataði eisini tey hernaðarligu kjarnorkuverkini. Eitt nú kannaðu eftirlitsmenn hjá orkumálaráðnum Los Alamos, har amerikanararnir gjørdu sína fyrst kjarnorkubumbu. Rich Lavenier sigur, at tað eydnaðist eftirlitsmonnunum at sleppa inn í Los Alamos og at stjala plutonium haðani, uttan at vaktarmenninir varnaðust nakað. Satt at siga møttu teir ongum vaktarmonnum, sigur Rich Lavenier.

Anson Franklin, sum er talsmaður hjá amerikonsku kjarnorkutrygdarmyndugleikunum, vísir orðunum hjá Rich Lavenier aftur.

## Danir keypa meiri sprutt

Avgerðin hjá donsku stjórnini at lækka avgjaldið á millum annað brennivíni hevur givið úrslit.

Síðani tann 1. oktober, tá lækkingin kom í gildi, hava danir keypt triggjar ferðir so nógvan sterkan løg, sum teir vanliga keyptu fyrr um vikuna. Tað eru serliga tær stóru handilsketurnar so sum Bilka, Quickly, Føtek og Netto, sum hava selt munandi meiri brennivín enn fyrr. Stjórin í Dansk Supermarked, sum eigur nakrar av handilsketunum, sigur við NTB, at fyrst fall prísurin á brennivíni, tí avgjaldið lækkaði, og harafturat hava viðskiftafólkini notið gott av, at handilsketurnar eisini kappast um at vera bíligast.

Hetta hevur havt við sær, at seinastu dagarnar hevur ein fløska av eitt nú Gammel Dansk ligið niðan fyri 90 krónur í donsku handlunum, men tað verður hildið, at prísurin fer nakað upp um stutta tíð.

## Prískríggj í luftini

Um nakrar vikur fer eitt nýtt flogfelag undir rutu millum Oslo og Stockholm. Felagið er eitt sokallað lágprísfelag, og tað fara hini flogfeløgini at kenna sviðan av.

Nordic Airlink, sum nýggja flogfelagið eitur, hevur longu kunngjørt, at tað fer at bera til at ferðast millum Oslo og Stockholm fyri minni enn 250 norskar krónur. Øll plássini í flogførunum verða ikki so bilig, men minst túsund ferðafólk sleppa at flúgva fyri tann prísin um vikuna, sigur felagið. Hini noyðast at gjalda 384 norskar krónur fyri túrin, og teir dýrastu ferðaseðlarnir fara at kosta 1059 norskar krónur.

Leiðslan í Nordic Link ásannar, at kappingin um ferðafólkini millum Oslo og Stockholm verður hørð, tí felagið skal kappast við bæði SAS og Norwegian. Ta fyrstu tíðina ætlar Nordic Link at hava átta ferðir millum Oslo og Stockholm um dagin. Sum er flýgur SAS trettan ferðir um dagin millum Gardermoen og Arlanda, og Norwegian hevur tvær dagligar ferðir á leiðini.

## Forseti væntar at missa flogfar

Forsetin í Argentina, Néstor Kirchner, hevur avlýst eina almenna ferð til Týsklands, Italia og Sveits. Hann skuldi flúgva við einum almennum argentinskum flogfari, men tað torir hann ikki.

Orsøkin er, at Argenina skyldar teimum trimum londunum pengar, og at landið hevur ikki megnað at halda lánsskyldurnar. Tí er forsetin bangin fyri, at lánsveitararnir fara at leggja hald á flogfar hansara, kemur hann til Evropa við tí. Bara í Týsklandi skyldar Argentina meiri enn 25 milliardir krónur, og tí kravdi Kirchner eina váttan frá týsku myndugleikunum um, at flogfar hansara fór ikki at verða tikið, lendi hann í Týsklandi við tí. Men eina slíka váttan kundi stjórnin í Berlin ikki veita honum.

Argentina hevur fyrr boðað frá, at landið ætlar sær bara at rinda ein fjórðing av uttanlandsskuldini, sum er 550 milliardir krónur, tí landið er heilt einfalt ikki ført fyri at rinda meiri.

# Noreg fær neyvan nakran undantakslimaskap í ES

**ES er ES. Tað er einki "ES-light", sigur týski uttanríkisráðharrin, Joschka Fischer**

NOREG OG ES
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað vakti stóran ans í Noregi, tá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharri, fyrradagin segði, at eftir hansara tykki hevði tað verið gagnligt fyri Noreg at farið upp í ES, men at Noreg má fáa ávís undantøk í limaskapinum. Hvørji undantøk hann hugsar um, vildi hann ikki siga.

Men Bondevik eigur ikki at vera ov bjartskygdur. Týski uttanríkisráðharrin, Joschka Fischer, sum er ein tann fremsti talsmaðurin fyri einum sameindum Evropa, segði við Aftenposten í gjár, at høvuðstankin við samstarvinum er, at tað skal umfata øll viðurskifti hjá limalondunum.

- Tað er rætt, at tað finnast nakrar serskipanir, men um tað gagnar nøkrum, veit eg ikki, og eg kann heldur ikki døma um tað, segði Joschka Fischer.

Ein kelda í Berlin sigur við Aftenposten, at tað ber ikki til hjá ES at gera viðmerkingar til orðini hjá norska forsætisráðharranum, tí ES má fyrst fáa at vita, hvørji undantøk hann hugsar um, eitt nú um laksurin skal inn í sáttmálan, og um oljan skal haldast uttanfyri.

Norðmenn eru ósamdir um tað, sum Bondevik hevur sagt. Formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Jens Stoltenberg, heldur, at tað var rætt av forsætisráðharranum at taka spurningin um ES-limaskap upp.



*Kjell Magne Bondevik er til reiðar at tosa um norskan ES-limaskap við undantøkum*
*Mynd: Reuters*

# Asia fær sítt ES

**Tíggju lond í Landssynningsasia hava gjørt av at skipa økið sum ein felags marknað innan 2020**

MARKNAÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sáttmálin varð undirskrivaður á toppfundi í ASEAN-felagsskapinum, og hann ber millum annað í sær, at allar tollforðingar millum londini skulu ruddast av vegnum innan 2020.

Tey tíggju londini eru Brunei, Kambodja, Laos, Vietnam, Indonesia, Filipsoyggjarnar, Singapore, Burma (Myanmar), Malaysia og Teiland. Umleið 500 milliónir fólk búgva í londunum, og felagsskapurin verður mettur at fáa stóran búskaparligan týdning undir liðini á teimum báðum fólkaríkastu londunum í heiminum, Kina og India.

Á fundinum umrøddu leiðararnir í teimum tíggju londunum eisini eina ætlan um ein fríhandilssáttmála við Kina. Stjórnarleiðararnir úr India, Japan og Suðurkorea vóru eisini á fundinum.

ítróttur
Nr. 190 • mikudagur • 8. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tór Ingar Akselsen til Molde

**Ungi sandavágsmaðurin, sum hevur leikt við HB seinastu tey árini, fór í gjár til Molde, har hann skal royndarvenja nakrar dagar**

FÓTBÓLTUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sandavági:**
Í gjár fór Tór Ingar Akselsen til Molde í Noreg, har hann skal royndarvenja í nakrar dagar. Væntandi kemur hann aftur longu í næstu viku, sigur hann.

Norska landskappingin, Tippeligaen, er komin so væl áleiðis, at tað verður enki burtur úr nøkrum spæli sleiðis kortini, sigur Tór Ingar. Einir tríggir dystir ella so eru eftir har yviri.

Tór Ingar Akselsen sigur, at hann sjálvur hevur fingið hetta sambandið í lag. Hann kennir fólk á leiðini, vísir hann á. Faðirin er ættaður haðani, og gjøgnum tey sambond, hann har hevur, er hendan venjingin so íkomin.

Tó so, at tá hann í summar kom við í landsliðshópin og eisini var á vøllinum onkran dystin, var tað við til at økja um áhugan har yviri, sigur hann.

Tór Ingar Akselsen fer at royndarvenja við Molde tað, sum eftir er av hesi vikuni, sigur hann. Longu mánadagin roknar hann við at vera aftur í Føroyum. So fara royndirnar og tíðin at vísa, hvussu tað verður við víðari sambandi tann vegin.

Hann sigur, at hann hevur í góðari tíð boðað felag sínum í Føroyum, HB, frá hesum møguleikanum, og at hann haðani er stuðlaður til at royna.

Ikki tí, sigur hann. Sáttmálin við HB er bara galdansdi í ár afturat, so hann er í grundini fríur at fara hvar sum helst. Men í løtuni er eingin avgerð tikin um hvat hann fer at gera, um hann ikki verður verandi í Molde.

Tað hevur verið upp á tal, at hann skuldi uttanlands í útnúgvingarørindum í vetur. Men um tað gerst til nakað meira við sambandinum við fótbóltin í Molde, verður tað helst til, at hann fer at royna tað fyrst, segði Tór Ingar Akselsen við Sosialin, beint áðrenn hann fór í flogfarið í Vágum týsmorgunin.



*Tór Ingar Akselsen fór í gjár til Noregs, har hann skal royndarvenja við fótbóltsfelagnum Molde*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Nýggj nevnd í Havnini

**Havnar Telvingarfelag hevði aðalfund mánakvøldið**

TALV
*tíðindaskriv*

Eitt av evnunum á skránni var nevndarvalið. Fyri vali stóðu Herluf Hansen, sum hevur verið skrivari seinastu 4 árini og Jóannes Guttesen, sum hevur verið formaður 3 tey seinastu árini og undan tí kassameistari í 1 ár. Hesir fóru frá eftir egnum vali og fyri teir vórðu valdir Olaf Berg og Arnbjørn Ó. Dalsgaard. Núverandi nevnd er sostatt mannað soleiðis: Olaf Berg, Arnbjørn Ó. Dalsgaard, Jóhan Gaard, Frants J. Eliassen og Ronny í Lon. Tiltakslimur er Herluf Hansen. Nevndin skipar seg sjálv.

Nøkur tiltøk verða á skránni í næstum og fer felagið at skipa fyri 80-ára jubilæumskapping leygardagin tann 25/10-2003. Kappingin verður skipað sum liðkapping millum tey ymisku feløgini í Føroyum. Sama kvøld verður veitsla - um undirtøkan er nóg stór.

Barnatelvingin byrjar aftur og verður telvað hvønn mikudag. Børn upp til 4. flokk telva frá kl. 16.00 til 18.00 og børn í 5. flokki og eldri frá kl. 18.00 til 20.00.

# Upp, niður ella hvørki

**Mikudagin verða tveir upp- og niðurflytingardystir leiktir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir dystirnar um vikuskiftið var greitt, hvussu leikast skal í seinastu dystunum á árinum, har stríðið um møguliga upp- og niðurflyting skal avgreiðast.

Millum fyrstu og aðru deild eru tað TB og Skála, sum skulu takast, og her verður fyrri dysturin á Tvøroyri mikukvøldið. Skála bjargaði sær í evsta umfarinum møguleikan, tá tað eydnaðist teimum at vinna 3-2 á EB/Streymi, og í mun til tann dystin eru ikki færri enn tríggir leikarar tøkir aftur. Teir eru Arnold Berg, Julian Florescu og Dusan Jaic. Hinvegin er Bogi Gregersen nú leikbannaður.

Og á Tvøroyri verður tað eftir øllum at døma eitt væl mannað TB-lið, sum tekur ímóti. Í seinasta landskappingardystinum spardi tvøramenn nakað av fólki, soleiðis at vandin fyri leikbanni ella skaðum kundi minimerast, og tí verður talan helst um lið í sterkastu uppstilling.

Tað er tó ikki bert millum tær báðar ovastu deildirnar, at dystir skulu leikast. EB/Streymur gjørdust næstfremstir í triðju deild, og teir fara mikukvøldið at taka ímóti LÍF í fyrra dystinum teirra millum um upp- og niðurflyting. Og týsdagin leiktu FS Vágar og Fram um plássið millum fjórðu og triðju deild.

Allir returdystirnir eru settir á skránna leygardagin.